Búskapur og vinna:

## BA skerjir rutur

Bretska flogfelagið British Airways arbeiðir við ætlanum um at skarva ein fjórðing av rutunum, sum felagið flýgur í Evropa. Felagið hevur sum er 62 rutur millum evropeisk lond, og sambært BBC ætlar leiðslan at strika 15 teirra.

Orsøkin til skerjingina er, at ferðafólkatalið um allan heimin er minkað nógv síðani yvirgangsatsóknirnar í USA tann 11. september.

Sambært BBC vil stjórin í British Airways, Rod Eddington, ikki siga, hvørjar rutur hjá felagnum verða tiknar burtur.

## Hørð tiltøk

Argentinar eru í øðini, eftir at stjórnin hevur samtykt nýggjar reglur, sum avmarka rættindini hjá fólki at nýta pengarnar, sum tey hava standandi í bankunum.

Sambært teimum nýggju reglunum verða allar lønarkonti við meiri enn 10.000 dollarum frystar í eitt ár, og tað sama verður gjørt við uppsparingarkonti, har meiri enn 3.000 dollarar standa á. Reglurnar siga eisini, at fólk kunnu einans taka 1500 peso av sínari lønarkonto og 1200 peso av sínari uppsparingarkonto um mánaðin.

Stjórnin sigur, at tiltøkini eru neyðug fyri at verja bankarnar.

Argentinski gjaldoyramarknaðurin hevur verið stongdur seinastu tíðina, men lat uppaftur í gjár.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Ætlaðu at spreingja Jeb Bush í luftina

**Amerikansku myndugleikarnir kanna, um nakrir menn ætlaðu at myrða guvernørin í Florida, Jeb Bush. Guvernørurin og George W. Bush, forseti eru brøður.**

ÚTLAND
*Árni Joensen*

Løgreglan í býnum Miami í Florida kannar málið, skrivar blaðið Miami Herald. Løgreglan fekk tíðindini um ætlanina frá einum manni, sum situr í fongslinum í Miami. Maðurin skal hava greitt løgregluni frá, at fýra menn av arabiskum uppruna høvdu lagt drápsætlanina.

Sambært manninum høvdu teir fýra menninir roynt at fáa fatur á einum leigudrápsmanni, sum skuldi renna ein lastbil fermdan við spreingievni í umsitingarhúsini hjá guvernørinum í høvuðsstaðnum Tallahassee.

Miami Herald skrivar, at løgreglan var í iva um trúvirðið hjá tí fongslaða manninum og helt, at hann kanska segði teimum eina søgu fyri at fáa betri viðferð og linari dóm, tá hann einaferð kemur fyri rættin. Kortini valdi løgreglan at kanna lastbilin, sum maðurin hevði greitt teimum frá. Einki spreingievni var í bilinum, men sambært Miami Herald komu teir servandu hundarnir hjá løgregluni fram á okkurt, sum kundi bent á, at spreingievni hevur verið í bilinum.

Eitt annað, sum ger, at myndugleikarnir taka frágreiðingina hjá tí fongslaða manninum fyri fult, er, at hann hevur nevnt teir fýra menninar aftan fyri ætlanina við navni, og at teir fýra standa allir á yvirlitinum við útlendingum, sum myndugleikarnir fegnir vilja hava hendur á.



*Jeb Bush, bróðir forsetans, George W. Bush, er guvernørur í statinum Florida. Á myndini eru brøðurnir saman við konum í ovala rúminum í Hvítu Húsunum*

Mynd: Reuter

# Blair ferðast ov nógv

**Nógvir bretar ilskast inn á Tony Blair, forsætisráðharra. Teir halda, at hann ger ov nógv burtur úr trupulleikunum aðrastaðni í heiminum og hugsar ov lítið um trupulleikarnar í sjálvum Bretlandi.**

ÚTLAND
*Árni Joensen*

Tað eru m. a. tey, sum arbeiða í jarnbreytarkervinum, sum halda, at forsætisráðharrin hevur gloymt teirra trupulleikar, og mikudagin boðaðu tey, sum arbeiða hjá South West Trains, frá, at tey fara í verkfall fyrsta dagin. Onnur, sum arbeiða í jarnbreytarkervinum aðrastaðni í Onglandi og í Skotlandi hava eisini sagt, at tey fara í verkfall seinni í mánaðinum.

Í postverkinum er støðan tann sama. Har hevur ein meiriluti av starvsfólkinum sagt, at tey eru eisini til reiðar at fara í verkfall fyri at mótmæla arbeiðsviðurskiftunum.

Misnøgdin kann fáa politiska ávirkan, tí nógvastaðni hava lokalar fakfelagsdeildir hótt við at stilla egin valevni upp til tað næsta lokala valið, og eygleiðarar siga, at verður jarnbreytarsambandið eitt av evnunum í valstríðnum, kann væl henda, at hesi nýggju valevnini fara at skúgva stuðlarnar hjá Blair til víks.

### Eisini millum politikarar

Seinastu dagarnar hava eisini fleiri politikarar sagt seg vera misnøgdar við, at Tony Blair ger so nógv burtur úr uttanríkispolitikkinum, meðan innanríkispolitiskar trupulleikarnir liggja á láni.

Formaðurin í uttanríkispolitisku nevndini hjá parlamentinum, Donald Anderson, sum er úr Arbeiðaraflokkinum eins og forsætisráðharrin, segði í gjár, at væl var ferðin hjá Blair í Pakistan og India væleydnað, men hann vildi kortini mæla forsætisráðharranum til at hugsa meiri um viðurskiftini í heimlandinum. Við blaðið The Independent segði Donald Anderson, at Blair eigur at skilja, at hjá mongum restar lítið í, til at bikarið flýtur yvir.

Nógvir bretar eru serliga misnøgdir, tí stjórnin eftir teirra tykki ger alt ov lítið við tað veksandi lógloysið í teimum stóru býunum og serliga í London.

Ein annar trupulleiki hjá stjórnini er heilsuverkið. Fólk noyðast at bíða leingi fyri at sleppa á sjúkrahús, men tey eru heldur ikki serliga fegin um uppskotið hjá stjórnini at hækka skattin fyri at útvega meiri pengar til heilsuverkið.

Eygleiðarar í London siga, at Tony Blair er um at missa sambandið við tann vanliga bretan.



*Tað eru m. a. tey, sum arbeiða í jarnbreytarkervinum, sum halda, at Tony Blair, forsætisráðharri, hevur gloymt teirra trupulleikar*

Mynd: Reuter

Úr Norðurlondum:

## Nevndir og ráð rúka

Danska stjórnin hevur nú gjørt álvara av ætlan síni at strika ein hóp av almennum nevndum og ráðum fyri at spara pengar á fíggjarlógini.

Stjórnarflokkarnir lovaðu longu undir valstríðnum at strika nógvar nevndir og ráð, sum eftir teirra tykki eru óneyðug og bara kosta pengar. Seinastu tíðina hevur stjórnin hugst at umleið 150 nevndum og ráðum, og í gjár ruku umleið 100 teirra.

Fyrrverandi stjórnarflokkarnir, Sosialdemokratarnir og Teir Radikalu, finnast hvassliga at avgerðini hjá stjórnini og siga, at stjórnin við hesum hevur brotið ein part av fólkastýrinum niður.

## Vil bara hava kvinnur

Svenski ráðharrin í innflytaramálum hevur vakt ans. Vanliga verður hetta ráðharrastarvið roknað sum eitt einsligt starv, men tað hevur Jan O. Karlsson gjørt nakað við.

Síðani hann tók við starvinum, hevur hann sett fleiri nýggj fólk í arbeiði á ráðharrastovuni, men tað sermerkta er, at allir teir nýggju medarbeiðararnir eru kvinnur. M. a. eru tað kvinnur, sum manna fimm tey ovastu størvini í innflytaramálaráðnum, og tað er als ikki vanligt í svensku stjórnini.

Sjálvur sigur Jan O. Karlsson, at tað er tann bera tilvild, at allir leiðarar hansara eru kvinnur, men hann viðgongur, at tað er munandi lættari at arbeiða á ráðharrastovuni nú.



# Genta og fuglur bjargað



ELDSBRUNI
*Ingrid Bjarnastein*

Í gjáramorgunin kom eldur í eini sethús í Traðarbrekku í Havn. Eldurin kyknaði í einum kjallararúmi. Sløkkiliðið kom skjótt á staðið og fingu teir køvt eldinum áðrenn hann fekk breitt seg um restina av húsinum. Veggirnir og loftið var av betong og var hetta eisini grund til, at eldurin ikki fekk breitt seg.

Ein ung genta, sum lá og svav í rúminum við síðuna av, varð fingin út, meðan sløkkiliðið eisini fekk bjargað einum kanariufugli.

Roykur var um alt húsið, men húsini eru ikki so illa farin. Tað kundi verið nógv verri um eldurin hevði fingið tíð at ment seg, sigur vakthavandi á Brandstøðini í Havn. Væl gekk at sløkkja, og eldurin var sløktur stutt eftir at sløkkiliðið var á staðnum. Orsøkin til eldsbrunan er ikki greið enn.

# Tavuni í Leirvík vantar 10-15 fólk

**– Vit lýsa eftir fólki, men tað gongur illa at fáa nóg mikið av arbeiðsmegi, sigur stjórin, Jóan Magnus Rasmussen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



Í Leirvík er nógv arbeiði. Har eru trý virki, sum arbeiða fisk, umframt IRF, sum eftirhondini hevur fleiri fólk í arbeiði. Í bygdunum uttan um og í Eysturoynni sum heild, er eisini nógv arbeiði, og tí kemur onkrum virki at vanta arbeiðsmegi.

Og soleiðis er á Tavuni í Leirvík, sum er best kent sum gulllaksavirki.- Vit hava lýst í bløðunum eftir fólki. Tað gjørdu vit eisini í fjør, men tað er trupult at fáa fólk, sigur Jóan Magnus Rasmussen og vísir á, at hann kundi hugsað sær, at tey vóru eini 10-15 fólk fleiri.

### Arbeiða upsa

Vanliga gulllaksasesongin er frá síðst í apríl til síðst í september, men í fjør var sesongin nakað longri.

- Okkara síðsti gulllaksadagur var, 17. oktober. Síðan lótu vit arbeiðsfólkið hava frí í eina viku, tí vit høvdu onga summarfrítíð havt. Vit byrjaðu aftur við upsa, 29. oktober, og síðani tá hava vit bara arbeitt upsa, sum verður virkaður til portiónir.

*- Í gulllaksatíðini arbeiða vit í trimum vaktum alla sesongina - í seks dagar um vikuna. Onkur dagur dettur burtur ímillum, men teir eru ikki nógvir. Nú vit arbeiða upsa, arbeiða vit í tveimum vaktum, sigur stjórin, Jóan Magnus Rasmussen*

Jóan Magnus sigur, at tá ið tey arbeiða gulllaks, verður arbeitt alt samdøgnið.

- Tá arbeiða vit við trimum vaktum alla sesongina í seks dagar um vikuna.Onkur dagur dettur burtur ímillum, men teir eru ikki nógvir. Nú vit arbeiða upsa, arbeiða vit í tveimum vaktum.

Á Tavuni arbeiða eini 60-70 fólk.

### Besta árið í nøgd

Í gulllaksasesongini fær Tavan fisk frá fýra trolarum; Stjørnuni, Polarhavi, Eysturbúgvanum og Vesturbúgvanum. Hesi skip eru tá burtur av á gulllaksaveiði.

Polarhav og Stjørnan hava roynt eftir gulllaksi í fleiri ár, og tað eru eisini nøkur ár, síðan Eysturbúgvin og Vesturbúgvin byrjaðu at fiska gulllaks og landa fast til virkið í Leirvík.

Árið 2001 var besta árið í nøgd hjá Tavuni; tá tók virkið ímóti 8.250 tonsum. Í ár 2000 var nøgdin 6.300 tons og í 1999 4.600 tons. 1998 var eisini eitt gott ár í nøgd; tá keypti Tavan yvir 6.000 tons av gulllaksi.

- Allur gulllaksurin verður virkaður til fars, og úrtøkan er umleið ein triðingur av ráfiskavektini.

Jóan Magnus Rasmussen sigur, at fiskurin er góður alla vertíðina.

- Eg haldi ikki, vit kunnu siga, at nakar serligur munur er á fiskinum gjøgnumsesongina, men á onkrum túri kann fiskurin verða eitt sindur verri enn annars, sigur hann.

Gulllaksur er yvirhøvur feitur og góður fiskur.

Tey, sum arbeiða á Tavuni, eru fyrst og fremst úr Leirvík og bygdunum uttan um, Fuglafirði og Gøtu. Onkur er úr Klaksvík og onkur úr Havn.

Meginparturin av rávøruni verður keyptur beinleiðis frá skipunum, men Tavan keypir eisini nakað um uppboðssøluna.

# Thorsen og Trads fingu 10 ár

**Kurt Thorsen og Rasmus Trads vórðu í gjár dømdir sekir í størsta málinum um svik og skjalafalsan í donsku søguni. Thorsen skal seks ár handan rimar, meðan Rasmus Trads fekk fýra ára fongsulsrevsing**

PFA-MÁLIÐ
*Magnus Dam, Keypmannahavn*

Tað loysti seg hjá Rasmus Trads at kæra dómin úr býarrættinum til Eystara landsrætt. Hann fekk skorið eitt ár av fongsulsrevsingini, so hann sleppur at sita fýra ár í staðin fyri fimm ár handan rimar. Høvuðsmaðurin í málinum, Kurt Thorsen fekk sama dóm sum í býarrættinum – seks ára fongsulsrevsing.

Verjin hjá Rasmus Trads kravdi annars í lagi tvey ára fongsul, og verjin hjá Kurt Thorsen kravdi frídøming. Dómararnir hildu ikki, at so mikið nógv nýtt kom fram í kærumálinum, at grundarlag var fyri at broyta dómin í býarrættinum, har teir vórðu dømdir fyri svik og skjalafalsan fyri tilsamans 3,6 milliardir krónur.

Við følskum váttanum royndu teir báðir at svika og fáa risastór lán í pengastovnum í Danmark og aðrastaðni. Pengarnar skuldi Kurt Thorsen brúka til at keypa partabrøv í fleiri feløgum og til at byggja íbúðir fyri milliardir í Spania.

Tað var, Jørgen Grønborg, sakførari, sum eisini var formaður í bankakanningarnevndini, sum gjørdi vart við, at alt ikki ruggaði rætt hjá teimum báðum. Eftir hetta rapaði korthúsið, og í januar 1999 vórðu teir báðir ákærdir og nú endaliga dømdir fyri svik og skjalafalsan.

### Endaligur dómur

Dómurin í landsrættinum er endaligur. Hann kann ikki kærast til Hægstarætt. Hinvegin kunnu teir kæra longdina á fongsulsrevsingini til Hægstarætt, men til hetta krevst eitt serligt loyvi.

Rasmus Trads, sum hevur viðgingið seg sekan í málinum, er helst nøgdur við dómin, nú hann fekk eitt ár styttri fongsulsrevsing enn í býarrættinum. Hinvegin er Kurt Thorsen helst sera ónøgdur, tí hann hevur alla tíðina tvíhildið um, at hann er ósekur og segði áðrenn úrskurðin í gjár, at hann roknaði við at verða frikendur.

Kurt Thorsen hevur áður víst, at hann kann koma aftur eftir at hava verið í mótvindi, men eygleiðarar rokna ikki við, at tað fer at eydnast honum hesuferð. Skemtingarsami, litríki handilsmaðurin kemur ikki at gera um seg aftur í donskum ella altjóða vinnulívi.